Evropameistari og barnaansari

Katrin Johansen hevur fyri kortum vunnið evropameistaraheitið í svimjing fyri brekað. Hon er útbúgvin lærari og undirvísir dagliga børnunum í forskúlanum hjá Sankta Frans Skúla. Seinnapartar hjálpir hon til á frítíðarstovuni hjá KFUM, har hon er stuðulslærari.

DIA MIDJORD

Hon er ikki komin sovandi til úrslitini, hon fyri kortum fekk í evropeisku svimjikappingini fyri brekað. Hóast hon nú tekur sær av løttum, so hevur hon vant einar 20 tímar hvørja viku. Minst triggjar av døgunum hevur hon vant tvær ferðir. Fyrst tíðliga á morgni, áðrenn fólk vanliga eru á fótum og síðani aftur seinnapartar.

Hon er útbúgvin lærari og arbeiðir um morgnarnar sum forskúlalærari í Sankta Frans skúla. Seinnapartar arbeiðir hon sum stuðulslærari hjá einum barni í KFUM.

Og tað er strævið, heldur Katrin.

– Eg havi eina arbeiðsviku á 35 tímar og venjingin krevur so aftur smáar 20 tímar, so tað gerst ov mótimikið, sigur hon.

– Skal eg halda fram, so verður tað grótharT. Eg royndi fjúrtan dagar at fáast við bæði venjing og arbeiði, og tað kláraði eg ikki í longdini, sigur Katrin.

– Skal eg halda fram við svimjing, so má eg finna útav onkrari loysn. Í hvussu so er, kláraði eg ikki at fáast við bæði í senn, sigur hon.

Børnini eru góð við hana

Hóast Katrin hevur eitt brek við eina beininum, so er hetta eingin forðing í gerandisdegnum. Børnini, sum hon dagliga undirvísir, spurdu nógv fyrstu tíðina, men so varð eisini hetta gloymt.

– Dagliga eri eg um 42 børn, so tað tók drúgva tíð at greiða frá mínum breki fyrstu fjúrtan dagarnar. Børnini eru fitt og sera beinrakin, tá tey spyrja. Tá tey hava fingið at vita søguna hjá mær, so hvørki undrast ella teska tey í krókunum, greiðir evropameistarin frá.

Gott fyri børnini

Gunvør á Lava, leiðari í forskúlanum, sigur, at nýggi lærarin hjá teimum hevur havt ómetaliga stóra ávirkan á børnini.

– Tá tíðina hon hevur verið vekk, hava børnini ótroyttiliga spurt um ymiskt. Nú aftaná at Katrin er heimkomin, vilja øll børnii sleppa at svimja, greiðir hon frá.

– Tá evropameistarin var í kapping, gjørdu børnini eina bók til hana. Øll teknaðu hvør sína tekning til svimjaran og tað sæst týðuliga, at tey eru áhugað í hesum persóninum, sigur hon.

Gunvør á Lava sigur, at tey nú fara at royna at svimja við børnunum, um skúlin loyvir hesum.

– So fær evropameistarin møguleikan at læra børnini eitthvørt, sum hon sjálv hevur lært, sigur Gunnvør.

Leiðarin sigur annars, at ikki bert børnini í forskúlanum, men so sannilga eisini børnini í teimum fyrsta flokkunum í skúlanum tosa um gull heiðursmerkini, ið Katrin hevur vunnið.

Hava tørv á slíkum

Leiðarin í frítíðarstovuni hjá KFUM, Sólva Johannesen, sigur, at eisini tey hava gleði av evropameistaranum.

– Børnini hava í hesum aldrinum tørv á at siggja upp til tey vaksnu, og tað gera tey í hesum tilfeldinum við lit, sigur hon.

Hon sigur víðari, at tað slepst ikki undan, at børnini spyrja, hví evropameistarin hevur eitt sindur øðrvísi gongulag.

– Man tá svarið er komið, so er tað úti av verðini, sigur hon.

Tá Katrin kom aftur til arbeiðis eftir kappingina, góvu børnini í KFUM henni eitt blómutyssi, og tey sungu eisini fyri evropameistaranum.

– Tað hevur ávirkan á børnini, og tað er avgjørt ein fyrimunur hjá okkum at hava slíka ítróttarstjørnu í starvi, sigur leiðarin í KFUM.

Evropeiski meistarin í svimjing hevur avgjørt stóra ávirkan á børnini, hon dagliga undirvísir

EM í svimjing fyri brekað 1995, Perpignan Suðurfrakland

Stuttur samandráttur av úrslitum:

200 m blandað svimjing
Katrin Johansen nr. 1. Tíðin 3.10.82
Durid Svensson og Esther Høj í finaluna í teirra bólki

400 m frísvimjing
Katrin Johansen nr. 1. Tíðin 5. 43.87
Durid Svensson nr. 4. Tíðin 6.38.82

100 m ryggsvimjing
Katrin nr. 1. Tíðin 1.30.10
Esther Høj og Durid Svensson í finaluna í teirra bólki

100 m frísvimjing
Katrin nr. 1. Tíðin 1.15.87. Europeiskt met
Esther Høj og Durid Svensson í finaluna. Báðar settu persónlig met.

100 m. bringusvimjing
Katrin Johansen nr. 2. Tíðin 1.48.91. Persónligt met
Esther nr. 3. Tíðin 1.58.76. Persónligt met

50 m. frísvimjing
Katrin Johansen nr. 3. Tíðin 0.36.27
Esther Høj og Durid Svensson í finaluna í teirra bólki. Báðar settu persónlig met.

Í tjóðkappingini var Føroyar - við bara trimum luttakarum - nr. 12 av 34 londum.

Íslandsrossini fara til síðstu kappingina í ár

Umframt føroyameistararnar í teimum trimum greinunum fjórgongd, fimmgongd og tølt, so skal eisini Hornasteypið latast tí riðara, ið samanlagt hevur flest stig í øllum kappingargreinunum. Tey ungu kappast eisini um vakurt ferðasteyp.

Kappingin verður á vøllinum hjá Føroyskum Íslandsrossafelag í Havnardali, sum er við Kráarheyg nakað omanfyri rossahúsini hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali.

Kappingin byrjar við innleiðandi umfari leygardagin, og so verða finalurnar sunnudagin. Kappast verður í fjórgongd, fimmgond og tølt. Tey ungu kappast í fjórgongd.

Dómararnir í kappingini, sum kanska hava torførastu uppgávuna, eru. Johan Láberg, Vinjard Joensen, Hendrik Rubeksen, Heðin Samuelsen, Thorman Kruse og Símun Justinussen.

Kappingin er tann síðsta í árinum og sostatt skal finast fram til, hvør gerst føroyameistari í greinunum, og hvør fær flest stig samanlagt. Hesin vinnur Hornasteypið í varðveitslu. Tey yngru undir 16 ár kappast um vakurt steyp til ognar.

Seinasta freist at fráboða luttøku er í dag.

Loysn á KROSSGÁTU 207

VEIÐI		TÍÐIN	NØMIN	TONS	SAMRÁÐAST	AV-Ø	VINNING	VARMA	FUGLIN	FYLIGRANI	JÚ	BLAÐ	LIKAMSLUTUR
PLAGGIÐ	N	Á	T	T	T	R	O	Y	G	G	J	A	N
GRUNI	Ó	R	I	EITT / EIN	I	GLÆRARA	K	L	Á	R	A	R	A
STOLIN	T	I	K	I	N	Á	U	FRUMEVNIÐ SELEN	S	E	TVEY EINS / SKARÁR	K	K
LIVI	A	N	I	VITA / SJÚKA	G	O	R	ELVT / ELSKAR	I	N	T	KOYR-A / ÆTT	K
VERJUNA	R	I	N	G	A	B	R	Y	N	J	U	N	A
KALHUM	K	PRÍS	ERT / RUNNAR	Ø	S	KONA / TRÆ	E	N	A	KONU	R	BELGIA	B
RØDD	A	L	T	FORNAVN / MÁT	T	A	N	N	LIVIR / RADF	E	R	MI / SUM TØVI	E
ÁHUSA	S	O	R	A	TORNAÐI	S	T	A	D	N	A	Ð	I
BENIÐ	T	V	Ø	R	S	K	U	R	Ð	U	R	I	N

Loysn á BARNAGÁTU 207

		FUGLALJÓÐ	ELSKAÐ	FIMTI TÓNI	KORNREITUR ELLA BYGD		TAKA GT?	SALTVATN	LAND
	F	L	U	G	A	BRÚ	Ý	L	I
VEKSIL	L	Á	N	FEGNAR / LÁ	K	Á	T	A	R
ÚT ...STEVNU	U	T	T	A	R	KOYRA / FIMMTI	A	K	A
SOLTONIN	G	KRÁKULJÓÐ	UMSTØÐUR	GØÐ / RIKA	A	L		A	N
	A	K	K	E	R	TONS	T	HINA	100 m²
SPILLA / BELGIA		R	O	T		T	Á	T	A
	B	Á	R	A		Á	R	A	R

Loyniorðið í krossgátu 207 var JARN og í barnagátu 207 FARRA.

Vinnari av krossgátuni var *Marjun Lindenskov, Láarvegur 4, 100 Tórshavn*, og av barnagátuni *Erland Nýggjagarð, 740 Hvannasund*.

Vinnararnir fáa ávikavist 100 og 50 kr. sendar við postinum.

Handverkarar ongar skatta fyrimunir

Formaðurin í Føroya Handverkarafelag, Høgni Højgaard, sigur í eini viðmerking, at teir skattafrádráttir, ið galdandi eru fyri føroyingar uttanlands, ikki nevna handverkararnar við einum einasta orði.

BEATE L. JENSEN

Tá formaðurin í felagnum Rækjuskip, Jákup Egholm Hansen, í farnu viku í fjølmiðlunum hevði grein um skattapolitikk landsstýrisisns, sum var at undirgrava rækjuflotan, nevndi hann, at politikkararnir ikki vóru samdir um spurningin at geva føroyskum fiskimonnum serligan skattafrádrátt so sum gjørt verður í grannalondunum.

Í sama viðfangi kom hann inn á, at somu politikkarar hava gjørt serligar skattafrádráttarskipanir fyri føroyskar handverkarar, sum arbeiða uttanlands.

Til hetta seinasta sigur Høgni Højgaard, formaður í Føroya Handverkarafelag, at tær skattafrádráttarreglur, sum komu í 1994, ikki nevna handverkararnar við einum einasta orði.

Galda fyri øll

Skattafrádráttarreglurnar galda fyri øll, eisini fyri teir føroyingar, sum hava bústað í Føroyum og sum fara til Danmarkar at koyra taxakoyring, grava rennur ella annað, sigur Høgni Højgaard.

Henda lógin, sum kom í 1994, varð longd í 1995, men tað er eingin vissa fyri, at hon eisini kemur at galda fyri 1996.

Annars sigur formaðurin í Føroya Handverkarafelag, at allir handverkarar eru sera væl fyri, tí teir hava allan heimin sum arbeiðspláss og hava bestu møguleikar at fara út í víðu verð at fáa sær arbeiði í hesum tíðum.

Martin V. Heinesen, Oljufyristingin:

Undirgrundin í Lopra áhugaverd

– Tilfarið í botninum undir boriholinum í Lopra er áhugavert. Har er feril av gassi og olju í vatninum, sum budlar upp úr holinum. Men vit fara ikki at bora eftir olju har, tí til tað krevjast so ógvuliga nógvar forkanningar fyri at raka beint. Tað vildi verið verðsins største lukkutreff, um ein fann olju

PÓL Á KLETTI

Í umbúna er at fara undir aftur boringar í Lopra.

Martin V. Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini, sigur, at ein leingi hevur hugsað um møguleikan at halda fram við royndarboringum í Lopra og at kanna um áhugi er millum oljufeløg at fíggja arbeiðið.

– Vit hava nú avgjørt at royna møguleikan. Eru oljufeløg sinnað at fíggja, ja, so byrja vit aftur. Av tí at hvørki vit ella DGU, sum vit samarbeiða við, hava nakrar royndir innan tær boringar, sum nú eru í umbúna, hava vit í fyrstu syftu avgjørt at heita á DONG um at hjálpa til at leggja arbeiðið til rættis, sigur hann.

Feløgini, sum verða biðin um stuðul, verða kallað til kunnandi fundar, har tey fáa eina freist til at hugsa seg um, um tey vilja binda seg ella ikki.

Fleiri oljufeløgini eru, ið bjóða seg fram, minni verður í part hjá teimum at gjalda.

Martin V. Heinesen roknar við, at Oljufyrisitingin fyri árslok hevur fingið endaliga greiði á, um nakað verður av ætlanini ella ikki.

- Um nakað verður úr ætlanin, verður sett á at bora komandi vár.

Uppá fyrispurning um hví áhugi er fyri serstøkum royndarboringum í Lopra og arbeiðið ikki er partur av teimum kanningum, sum nú fara fram á føroyska økinum, svarar Martin V. Heinesen:

- Vit vilja fegin vita, hvussu undirgrundin hjá okkum sær út. Seismiskar kanningar eru nú at kalla gjørdar runt á øllum økinum, m.a. eisini í boriholinum í Lopra. Fyrst gjørdu vit nakrar kanningar í 1989 og í fjør gjørdi Western nýggjar kanningar. Hesar kanningar geva ávísar ábendingar um, at grótslagið skiftir. Tær fyrstu ábendingarnar eru uml. 200 metrar undir sjálvum botninum í holinum. Men hvat tilfarið er, vita vit ikki. Hetta er ikki ein oljuboring, tí áðrenn tílíkar boringar byrja, verða nógvar og drúgvar kanningar gjørdar áðrenn, hvar møguleikar eru at finna olju. Hetta er ein vísindalig boring, sum byrjaði longu í 1981, og sum ikki hevði nakað við olju at gera. Tað vildi verið verðsins største lukkutreff, um ein fann olju akkurát har, sigur Martin Heinesen.

Martin Heinesen upplýsir tó, at ein lítil feril av olju og gassi er í tí vatninum, sum budlar upp úr boriholinum í Lopra, og tað bendir á, at undirgrundin ikki er steindeyð. Tí kann tað hava áhuga at kanna tilfarið í undirgrundini gjøllari.

– Um man leitaði eftir olju og fann hasa nøgdina, so hevði man karakteriserað undirgrundina sum skróvturra og als ikki áhugaverda at bora meira í. Men av tí, at eingin boring er gjørd í føroyska økinum, sum fer niður gjøgnum basaltið, hevur ein ongan ítøkiligan kunnleika, hvussu undirgrundin í roynd sær út, sigur hann.

RENDI Á KIRKJUGARÐIN. Týskvøldið rendi ein bilur beint á kirkjugarðin við Velbastaðvegin, og fór stoypti garðurin illa, so sum myndin gevur eina ábending um. Bilurin fór somuleiðis illa, men bilføraranum hendi einki. Orsøkin til hendingina var ikki rúsdrekka, men helst ov nógv ferð, tí maðurin, sum koyrdi, misti tamarhaldið á bilinum.

Mynd: Diml./Jens Kristian